## Óvæntað uppsøgn

Tað var einki minni enn ein bumba, tá danski samráðingarleiðarin upp undir veðurlagsráðstevnuna í Keypmannhavn, Thomas Becker, brádliga segði seg úr starvinum fríggjadagin, nú bara tveir mánaðir eru eftir, til ráðstevnan verður í Keypmannahavn. Alment varð sagt, at hann hevði sagt upp orsakað av óskili í roknskapinum frá einari samráðingarferð, men sambært kringvarpinum DR var tað bara ein partur av sannleikanum. Í tíðindunum í gjárkvøldið kom fram, at talan var eisini um eina innanhýsis uppgerð í veðurlagsmálaráðnum og um kapping millum veðurlagsmálaráðið og forsætismálaráðið.



## Íslendingar kanna makrel

Íslendingar leggja stóran dent á at fáa staðfest, hvussu makrelurin ferðast í íslendskum sjógvi, hvussu nógvur makrelur er har, og hvussu leingi hann er innan fyri íslendska markið. Teir seinastu dagarnar hava fýra skip leitað eftir makreli úti fyri Eysturlandinum og suðureftir. Vísir skrivar frá einum av skipunum, at teir sóu makrel og eisini nakað av sild. Sambært skiparanum var hetta íslendsk summarsild og norðhavssild. Ísland var fyri hvøssum atfinningum, tá landið ásetti sær stóra makrelkvotu fyri árið í ár.

# Nýggj PhD-verkætlan innan aling á sjónum

**Fiskaaling fer nú undir eina nýggja PhD-verkætlan, sum skal kannað umhvørvið í aliringum á sjónum. Verkætlanin, sum ber heiti "Vatngóðska innan aling á sjónum", er skipað sum eitt samstarv millum Fiskaaling, Náttúruvísindadeildina, SINTEF í Noregi og føroysku alivinnuna**



TÍÐINDASKRIV

Aliútgerðin, serliga nótirnar, og fiskurin í nótunum ávirka rákið í og kring nótirnar, sum verða brúkar í aling á sjónum. Um illa vil til, kann hetta verða viðvirkandi orsøk til vánaligan trivnað hjá fiskinum, sum sæst aftur sum slakari vøkstur og verri sjúkumótstøðuføri. Málið við hesi PhD-verkætlan er at fáa neyvan kunnleika um hvussu útgerð og fiskur ávirkar aliumhvørvi í nótunum í einum alibrúki á bæði vardum økjum inni á firðum og á meira harðbaldum økjum longri úti.

Heini Rasmussen, sum í løtuni starvast hjá Haldor Topsøe A/S í Danmark við FEA-modellering, er settur í starv til PhD-verkætlanina. Hann er útbúgvin civilverkfrøðingur á maskinlinju frá DTU í Danmark og byrjar í nýggja starvinum á Fiskaaling um ársskifti 2009/2010.

PhD-verkætlanin verður liðug í 2013 og úrslitini verða kunngjørd í altjóða granskingartíðarritum og á ráðstevnum. PhD-verkætlanin verður fíggjað av Fiskaaling, Granskingarráðnum og SINTEF.

### Týdningarmikil úrslit

Tað er vælkent, at aliútgerð á sjónum, serliga nótirnar, ávirka rákið í og kring nótirnar. Øystein Patursson, ið nú starvast sum granskari á Fiskaaling, hevur í eini PhD-verkætlan frá 2008 ment eitt model til at modellera rákið í og kring eina alinót.

Í nýggju verkætlanini verður arbeitt víðari við hesum modellinum við denti á at fáa vitan um eitt heilt alibrúk við fleiri nótum. Harumframt er ætlanin at kanna ávirkanina frá fiskinum á rákið og súrevnisnøgdina í sjónum. Úrslitini frá verkætlanini vera týdningarmikil fyri framtíðaraling, bæði á innaru aliøkjum og á meiri útsettum aliøkjum.

Á vardum økjum við lítlum ráki, kann útskiftingin av sjógvi í nótunum vera í minna lagi, serliga á alibrúkum við nógvum ringum. Mátingar vísa, at súrevnisinnihaldið í sjónum í slíkum førum vanliga fer niður. Hetta hevur við sær at trivnaðurin hjá fiskinum vesnar og um hetta hendir ofta, kann hetta elva til strongd, vánaligan vøkstur og møguliga eisini niðursett mótstøðuføri mótu sjúku. Við betur kunnleika til hesi fyribrigdi, kann alarin arbeiða fyribyrgjandi og taka hædd fyri tíðum við lágum súrevnisinnihaldi í alinótunum.

Á útsettum aliøkjum er størsti trupulleikin stóru hydrodynamisku kreftirnar ið virka á aliútgerðina. Avbjóðingin á hesum økjum er at menna aliútgerð, sum megnar at standa ímóti náttúrukreftum, og samstundis varðveita eitt umhvørvi í alinótum, sum gevur best møguligan trivnað hjá fiskinum í nótunum. Betri vitan um hesi viðurskifti er avgerandi, um aling á opnum havi skal gerast veruleiki.

### Tvær verkætlanir

Á Fiskaaling eru tvær aðrar vinnuligar PhD-verkætlanir í gongd:

Verkætlanin "Fitisýran TTA í eini dynamiskari framleiðslu av atlantiskum laksi" skal kanna, hvussu ein dynamisk samanseting av fóðri kann lagast til ymisk fysiologisk og umhvørvislig viðurskifti fyri at tryggja eina optimala framleiðslu av alilaksi. Verkætlanin er ein partur av eini størri strategiskari verkætlan um optimering av laksaaling, og er fíggjað av Norges Forskningsråd. Luttakararnir eru Nofima í Noregi, IFREMER í Frankaríki og Fiskaaling. Regin Arge, granskari á Fiskaaling, tekur hesa PhD-verkætlan og hann er innskrivaður við Univeristet for Miljø- og Biovitenskap í Ås, Noreg.

Verkætlanin "Ílegukanningar av toski av Føroyabanka og landgrunninum" skal lýsa genetiska strukturin í teimum báðum føroysku toskastovnunum, og skal varpa ljós á viðurskifti í sambandi við aling av føroyskum toski. Tað er Petra Petersen, granskari á Fiskaaling, sum tekur hesa PhD-verkætlan og hon er innskrivað við Institute of Aquaculture á University of Stirling í Skotlandi. Verkætlanin, í er fíggjað av Fiskaaling og Granskingarráðnum er eitt samstarv millum Fiskaaling, Havforskningsinstuttet i Bergen, Náttúruvísindadeildina, Havstovuna og Nofima í Noregi.


## ST-DAGUR Í NORÐURLANDAHÚSINUM

JAVNSTØÐUNEVNDIN OG DEMOKRATIA SKIPA Á ST DEGNUM 24. OKTOBER FYRI TILTAKI UM CEDAW, SUM ER KVINNURÆTTINDASÁTTMÁLIN HJÁ ST

Tiltakið byrjar klokkan 15 og endar klokkan 17.

SKRÁIN FYRI TILTAKIÐ ER HENDAN:



**ST – SÁTTMÁLAR – GERA TEIR NAKRAN MUN?**
**Elin Mortensen,** stjórnmálafrøðingur og forkvinna í Amnesty International Føroya Deild



**FØROYAR Á JAVNSTØÐULEIÐ – NIÐURSTØÐUR FRÁ CEDAW NEVNDINI**
**Pól Egholm,** cand.merc., málsviðgeri á Sendistovu Føroya í Keypmannahavn, Uttanríkisráðið



**RETHINKING EMPOWERMENT – CEDAW AS A TOOL**
**Prof. Dr. Jur. Herdís Thorgeirsdóttir,** sakførari og lektari við Bifrost, lærustovn í Íslandi. Forseti í European Women Lawyers' Association, sí www.ewla.org



ORÐSTÝRARI VERÐUR DORIT HANSEN, CAND.MAG.

Tiltakið er alment og ókeypis.

DEMOKRATIA

JAVNSTØÐUNEVNDIN